LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 20. juni 2013
J.Nr.: 17/201200055-48
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

viðv. handfaringini hjá Tvøroyrar kommunu og Tórshavnar kommunu av innlitsáheitanum frá Kringvarpi Føroya

Við teldubrævi 12. august 2012 hevur A í Kringvarpi Føroya sent umboðsmanninum eina klagu um handfaringina hjá ávikavist Tvøroyrar kommunu og Tórshavnar kommunu av áheitanum um innlit í samskiftið millum kommunurnar um brunateknisku byggimálsviðgerðina í einum máli hjá Tvøroyrar kommunu.

Umframt hesi viðurskifti, fevndi klagan eisini um onnur viðurskifti hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við, at Kringvarp Føroya framleiddi sjónvarpssendingina ”Brandfellurnar” á vári 2012. Eg havi gjørt av bert at viðgera tann partin av klaguni, sum snýr seg um handfaringina hjá kommununum av innlitsáheitanunum.

Í klaguni verður m.a. víst á, at Tvøroyrar kommuna noktaði at hava samskift við Tórshavnar kommunu um bygging av uppisjóvarvirki á Tvøroyri, at Tvøroyrar kommuna sýtti fyri at geva klagaranum innlit og bað hann venda sær til Tórshavnar kommunu um hetta, at hvørki Tvøroyrar ella Tórshavnar kommuna góvu klagaranum fult innlit í málið, og at Tórshavnar kommunu ikki skrásetti skjøl at vera móttikin fyrr enn ein mánað eftir, at tey vóru móttikin.

Gongdin í málinum er nærri lýst undir málsgongdini.

**Málsgongd**

Sambært skjølunum, ið fylgdu við klaguni, og skjølunum hjá Tórshavnar kommunu og Tvøroyrar kommunu, sum umboðsmaðurin hevur havt til láns, hevur gongdin í málinum verið hendan:

Við teldubrævi 11. mai 2012 sendi B, deildarleiðari á byggideildini í Tórshavnar kommunu, Tvøroyrar kommunu soljóðandi áheitan um innlit:

> ”Umbøn um innlit

Traðagøtu 43 · Postrúm 2008 · FO-165 Argir · Tlf 358500 · Faks 358501 · lum@lum.fo · www.lum.fo

> Vit loyva okkum hervið at biðja um innlit í øll skjøl viðvíkjandi viðgerðini av byggiumsóknini um nýggja uppsjóvarvirkið á Tvøroyri, sum C lata byggja. Vit ynskja at fáa avrit av øllum skjølum, herundir m.a. tekningum og brunateknisku byggimálsviðgerðini."

Tvøroyrar kommuna váttaði við teldubrævi sama dag, at áheitanin var móttikin.

Við teldubrævi 14. mai 2012 sendi klagarin Tvøroyrar kommunu soljóðandi innlitsáheitan:

> "Eg havi frætt, at Tórshavnar kommuna hevur biðið um innlit í alt arbeiðið, sum er at gera móttøkuvirkið á Tvøroyri. Kunna tit vátta hetta og senda mær innlitsumbønina hjá Tórshavnar kommunu ?"

Við teldubrævi 15. mai 2012 tók deildarleiðarin í Tórshavnar kommunu innlitsáheitanina aftur við soljóðandi teldubrævi:

> "Vit skulu hervið kalla aftur hesa umbøn um innlit, tá hon ikki er aktuell longur.
> Vit biðja tykkum halda okkum til góðar!"

Sambært teldupostsamskifti millum D, kommunustjóra í Tórshavnar kommuna og klagaran 25. – 27. juni 2012 bað kommunan sama dag, t.v.s. 15. mai – munnliga - Tvøroyrar kommunu um at lata Tórshavnar kommunu umbidnu upplýsingarnar, tí tær høvdu týdning fyri málsviðgerð av einum líknandi máli í Tórshavnar kommunu.

Tann 15. mai 2012 sendi E, leiðari á teknisku deild í Tvøroyrar kommunu, klagaranum soljóðandi svar uppá innlitsáheitanina:

> "Vit hava onga innlitsumbøn frá Tórshavnar kommunu í sambandi við byggjan av móttøkuvirki á Tvøroyri."

Seinni sama dag sendi klagarin E soljóðandi fyrispurning:

> "Er ongin fyrispurningur frá nøkrum komin um innlit í byggimálsviðgerðina av móttøkuvirkinum?"

Seinni sama kvøld svaraði E fyrispurninginum noktandi.

Sambært klaguni váttaði E í Tvøroyrar kommunu í telefonsamrøðu við klagaran tann 18. mai 2012, at Tórshavnar kommuna hevði sent Tvøroyrar kommunu eina innlitsáheitan, men at hendan var tikin aftur. Sama dag sendi klagarin soljóðandi teldubræv til E í Tvøroyrar kommunu:

> "Kanst tú senda mær bæði innlitsumbønina og afturtøkuna av umbønini frá Tórshavnar kommunu?"

21. mai 2012 sendi E í Tvøroyrar kommunu klagaranum soljóðandi svar uppá áheitanina frá 18. mai:

> "Sum vit tosaðu um í telefon í seinastu viku, so hava vit onki mál um innlit frá Tórshavnar kommunu.
> Eg havi kunnað F, borgarstjóra, um málið, og alt samskifti víðari skal verða við hann."

21. mai 2012 skrivaði borgarstjórin í Tvøroyrar kommunu, F, soljóðandi notat:

> ”A frá Kringvarpinum ringdi til mín áðrenn døgurða og bað um innlitsumbøn og afturtøku av umbønini frá Tórshavnar kommunu viðvíkjandi byggingini av uppisjóvarvirkinum. Vit táttast eina løtu um, um hetta er eitt mál ella ikki. Eg haldi uppá, at umbønin er afturkallað og tískil er onki mál.”

Sambært klaguni váttaði borgarstjórin í Tvøroyrar kommunu í telefonsamrøðuni, at kommunan hevði móttikið og journaliserað tveir teldupostar frá Tórshavnar kommunu og upplýsti klagaranum, at hann kundi venda sær til Tórshavnar kommunu, um hann ynskti at fáa innlit í hesar.

21. mai 2012 skrivaði G, kommunustjóri í Tvøroyrar kommunu soljóðandi notat:

> ”A frá Kvf ringdi til mín fyrrapartin viðv. tveimum teldupostum, hann hevði biðið um innlit í. Hann hevði tosað við F og E, men fekk ikki teldupostarnar, ið hann segði vera eina innlitsumbøn frá Tórshavnar kommunu viðv. nýggja virkinum á havnalagnum, og eina afturkalling av umbønini. Eg segði, at eg kendi ikki til hetta málið. A helt tað vera løgið, at eg ikki skuldi kenna til hetta málið, men eg segði aftur, at eg kendi ikki til hetta málið, men eg skuldi kanna tað.”

21. mai 2012 sendi klagarin Tórshavnar kommunu soljóðandi innlitsáheitan:

> ”Eg vil hervið biðja um innlit í samskifti millum Tórshavnar og Tvøroyrar kommunu um uppisjóvarvirkið/móttøkuvirkið á Tvøroyri”

23. mai 2012 sendi klagarin soljóðandi teldupost til B, deildarstjóra á byggideildini í Tórshavnar kommunu:

> ”Viðvíkjandi innlitinum um samskiftið millum Tórshavnar og Tvøroyrar kommunu um móttøkuvirkið á Tvøroyri - kanst tú leggja skjølini oman í Snarskivuna, so kann eg avheinta tey skjótast gjørligt?”

Sama dag sendir sendi B klagaranum soljóðandi svar:

> ”Vit hava móttikið umsóknina, og tú fært svar innan 10 dagar.”

Dagin eftir, tann 24. mai 2012, sendi klagarin soljóðandi teldupost til B:

> ”Kanst tú ikki ein gongd senda mær tíðspunktini fyri nær ávíkavist innlitsumbøn og afturkalling eru send? Tað skuldi verið sera skjótt at funnið út av.”

Sama dag sendi B klagaranum soljóðandi svar:

> ”Eg havi biðið journaldeildina um at finna málini fram, og ert tú vælkomin oman her á byggideildina í gamla posthúsbygninginum á Vaglinum mánadagin 28/05 at hyggja málini ígjøgnum.”

25. mai 2012 sendi G, kommunustjóri í Tvøroyarar kommunu klagaranum soljóðandi teldupost:

> ”Skjølini liggja klár til tín at hyggja at í móttøkuni á býráðsskrivstovuni, ið er opin mánadag til tórsdag kl. 09.00-16.00 og fríggjadag kl. 09.00-15.00. Um tú ynskir avrit av skjølunum, fært tú hetta móti gjaldi áljóðandi kr. 20,- smb. kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um innlit í fyrisitingina. Ynskir tú hetta, kann peningurin flytast á konto hjá Tvøroyrar kommunu nr. 6460-220.113.7, ella gjaldast kann við avheintan. Gjørt verður vart við, at gjaldast kann ikki við gjaldskorti. Um peningurin verður

> fluttur á konto hjá kommununi, verður tú vinarliga biðin um at hava kvittan við á býráðsskrivstovuna."

Sambært skrivligari váttan í skjølunum hjá Tórshavnar kommunu fekk klagarin 28. mai 2012 innlit í málið á Snarskivuni í Tórshavnar kommunu. Sambært klaguni fekk hann tó ikki skjølini, sum Tvøroyrar kommuna lat Tórshavnar kommunu um bygging av uppisjóvarvirkinum á Tvøroyri.

Skjølini, sum Tvøroyrar kommuna lat Tórshavnar kommunu - *Góðkenning av PIR-bygningselementum*, dagfest 20. februar 2012 og *Góðkenning av brunadeildarveggjum – bygningurin hjá uppisjóvarvirkinum C*, dagfest 6. mars 2012 - vórðu av tekniska stjóranum í Tvøroyrar kommunu borin borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu miðskeiðis í mai mánað, men vóru ikki skrásett at vera móttikin fyri enn 15. juni 2012 (Hetta framgongur av teldupostsamskifti millum D, kommunustjóra í Tórshavnar kommunu og klagaran tann 25. og 27. juni 2012, *mín viðm.*)

## Partshoyring

Fyri at umboðsmaðurin kundi taka støðu til, um hetta var eitt mál, sum umboðsmaðurin kundi ella átti at taka upp til viðgerðar, varð klagan send Tvøroyar kommunu og Tórshavnar kommunu til ummælis við eini freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis vóru kommunurnar bidnar um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 31. august 2012 sendi Tvøroyar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "<u>Viðv. klagu frá Kringvarpi Føroya, tykkara j.nr. 17/201200055:</u>
> Tvøroyrar kommuna fær hin 14. mai 2012 eina umbøn frá Kringvarpi Føroya, A um innlit í eina innlitsumbøn frá Tórshavnar kommunu.
> 15. mai 2012 afturkallar Tórshavnar kommuna teirra innlitsumbøn. Tískil verður mett, at hetta ikki longur er eitt mál.
>
> 18. mai biður Kringvarp Føroya, A um innlit í innlitsumbønina og afturkallingina frá Tórshavnar kommunu, men av tí, at umbønin frá Tórshavnar kommunu er afturkallað, verður ikki mett, at hetta er eitt mál.
>
> Eftirfylgjandi verður tó mett, at Kringvarp Føroya, A hevur rætt til innlit í teldupostarnar við innlitsumbøn og afturkalling frá Tórshavnar kommunu, smb. lógini um innlit í fyrisitingina, og innlitið verður givið Kringvarpi Føroya, A 25. mai 2012.
>
> Viðmerkjast skal, at Tvøroyrar kommuna als ikki hevur havt ætlanir um at halda nakað dult í hesum málinum, men skal sjálvsagt eins og øll onnur halda galdandi lógir.
>
> Viðløgd eru avrit av skjølunum í málinum."

Tann. 11. september 2012 sendi Tvøroyrar kommuna umboðsmanninum brot úr bókini Offentlighedsloven – *med kommentarer* eftir John Vogter, har spurningurin um rættin til at fáa innlit í eina umsókn, sum er tikin aftur, verður viðgjørdur. Hetta er sama sjónarmið, sum Tórshavnar kommuna førir fram í skrivi, dagfest 24. september 2012. Tvøroyrar kommuna hevur ikki greitt nærri frá síni støðu í hesum sambandi, og tískil fati eg hetta sum, at kommunan hevur broytt støðu í mun til frágreiðingina, dagfest 31. august 2012, har sagt varð, at kommunan metti klagaran hava rætt til innlit.

Tann 24. september 2012 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing um viðgerðina av málinum:

"...
**Um innlit hjá Tvøroyrar kommunu í sambandi við C**
A klagar eisini um eitt annað mál, har starvsfólk hjá Tórshavnar kommunu hava biðið um innlit hjá Tvøroyrar kommunu í eitt mál um bygging av uppisjóvarvirkinum hjá C á Tvøroyri. Í hesum sambandi setir A fram nakrar leysar spekulatiónir um orsøkirnar hjá Tórshavnar kommuna fyri at biðja um nevnda innlit, nevniliga at undirgrava trúvirðið hjá fyrrverandi leiðaranum á Brunaumsjón landsins, H. Ógreitt er, hvussu nevnda innlitsumbøn skuldi kunnað undirgrivið trúvirðið hjá fyrrverandi leiðaranum á Brunaumsjón landsins, men hesar spekulatiónir hava onki við veruleikan at gera.

Tórshavnar kommuna er av teirri fatan, at nevnda mál um alment innlit als ikki eigur at verða fatað sum nakað "mál". Tvær grundir eru til hesa fatan.

Fyri tað fyrsta er sera ivasamt, um tey skjøl, sum Tórshavnar kommuna hevur móttikið frá Tvøroyrar kommunu, eru at rokna sum móttikin "sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð". Skjølini innganga í eitt mál hjá Tvøroyrar kommunu, nevniliga nevnda byggimál hjá C. Men tað er sera ivasamt, um til ber at siga, at nevndu skjøl í heila tikið innganga í eitt mál hjá Tórshavnar kommunu. Skjølini vórðu ikki partur av málsviðgerðini hjá Tórshavnar kommunu, men vóru ætlað sum kunnandi tilfar til málsviðgerðarnar um, hvussu byggimálsviðgerðin í mun til slík virki fer fram í øðrum kommunum, nú teir skuldu undir eina líknandi málsviðgerð í Tórshavnar kommunu. Skjølini vóru ikki neyðug fyri nakra málsviðgerð í Tórshavnar kommunu og kunnu tískil meira samanberast við bókmentir og annað kunnandi bakgrundstilfar. Tískil metir kommunan ikki, at hetta almenna innlitið hjá starvsfólkum í Tórshavnar kommunu hevur nakran fyrisitingarrættarligan týdning, tá tað ikki á nakran hátt var liður í málsviðgerðini hjá kommununi.

Harnæst afturkallaði starvsfólk hjá Tórshavnar kommunu sína umbøn um innlit hjá Tvøroyrar kommunu. Orsøkin til afturkallingina var, at Tórshavnar kommuna munnliga hevði biðið um skjølini. Eftir vanligum innlitsreglum (John Vogter, Offentlighedsloven med kommentarer, s. 138) kann innlitsumbøn afturkallast, um ikki myndugleikin av serligum orsøkum noyðist at fasthalda umbønina. Ongar slíkar umstøður eru í hesum máli, og tí metir kommunan, at onki mál var aftaná, at umbønin var afturkallað.

A heldur eisini uppá, at borgarstjórin í Tórshavnar kommunu sigur ósatt, ella at báðar kommunurnar, Tvøroyrar og Tórshavnar, ikki hava røkt sína notatskyldu. Fyrst er at siga, at borgarstjórin í Tórshavnar kommunu segði ikki ósatt. Harnæst metir kommunan, at notatskyldan í innlitslógini § 6 bara er galdandi fyri mál, har avgerð fer at verða tikin. Í hesum føri er ikki talan um avgerðarmál. Av tí at talan ikki er um fyrisitingarrættarliga málsviðgerð í heila tikið, metir kommunan heldur ikki, at talan kann verða um at misrøkja eina víðkaða notatskyldu til at skriva upp alt týdningarmikið kring eitt mál - eisini ikki-avgerðarmál - tí her var stutt og greitt onki mál.

Á hesum grundarlagi metir kommunan ikki, at tað fyrsitingarrættarliga hevur týdning, hvørt av starvsfólkunum hjá hesum báðum kommunum segði hvat og nær í spurninginum um, hvørt innlitsumbønin var móttikin, ella nær skjølini vóru skrásett sum móttikin.

Vísandi til hesi viðurskifti skal kommunan heita á Løgtingsins umboðsmann um at vísa klaguni frá A / KVF frá sær. Samstundis skal kommunan gera vart við, at teir løgfrøðiligu spurningar, sum eru mest viðkomandi í hesum máli – nevniliga um fjølmiðlaetisku leiðreglurnar eru settar til viks av KvF – í løtuni bíða eftir eini niðurstøðu frá Fjølmiðlakærunevndini.
..."

Tann 21. februar 2013 boðaði umboðsmaðurin pørtunum frá, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

Tann 20. mars 2013 heitti umboðsmaðurin á Tórshavnar kommunu um at læna sær skjølini, sum Tvøroyrar kommuna sendi Tórshavnar kommunu um byggimálsviðgerðina av uppsjóvarvirkinum. Tórshavnar kommuna varð samstundis biðin um at greiða frá, um klagarin hevði fingið innlit í øll skjølini, og um ikki, hvør grundgevingin var fyri hesum. Tvøroyrar kommuna og Tórshavnar kommuna vórðu somuleiðis bidnar um stutt at greiða umboðsmanninum frá, undir hvørjum kørmum innlit varð latið klagaranum, eins og klagarin varð biðin um at greiða frá hesum sama.

Tann 24. mars 2013 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> ”…
> Tórshavnar kommuna bað meg koma oman á Skivuna at hyggja gjøgnum málið.
>
> Tvøroyrar kommuna sýtti upprunaliga bæði munnliga og skrivliga fyri, at har var nakað at geva innlit í. Síðan viðgekk Tvøroyrar kommuna, at har var eitt samskifti, men vit máttu venda okkum til Tórshavnar kommunu, um vit ynskja innlit í hetta. Eftir at vit høvdu tosað við Tórshavnar kommunu, vendi Tvøroyar kommuna aftur og upplýsti okkum ein kostnað, og at skjølini vóru tøk á skrivstovuni, tá vit høvdu goldið.
>
> Men sum eg áður havi greitt frá, har var onki tilfar í skjølunum frá báðum kommunum, sum bendi á, at tilfar um brunatrygd á uppsjóvarvirkinum var sent millum kommunurnar. I hevði annars greitt frá, at Tórshavnar kommuna trekti sína innlitsumbøn aftur, tí tilfarið, sum Tórshavnar kommuna ynskti at fáa, var longu sent til Tórshavnar. D, kommunustjóri í Tórshavn, vil eisini vera við, at so var. Tilfarið var tó ikki stemplað sum móttikið fyrr enn ein mánað seinni. Nemliga dagin eftir at H spurdi eftir, hvat tilfar kommunan hevði móttikið; tá hevði kommunan brádliga aftur tørv á hesum skjølunum.
>
> Tí standi eg enn spyrjandi:
> Hví var Tórshavnar kommuna áhugað í brunaviðurskiftum á C (um tað ikki var, soleiðis sum fleri keldur fortaldu mær, at tað var tí, at mann væntaði at finna eitthvørt at nýta móti trúvirðinum hjá H)?
>
> Hví hvarv áhugin hjá Tórshavnar kommuna fyri hesum tilfari, so skjótt sum Kringvarpið spurdi um tað (tá alt bendir á, at Tórshavnar kommuna onki tilfar hevði fingið av Tvøroyri, tá Tórshavnar kommuna trekti sína innlitsumbøn aftur)?
>
> Hví avnoktaði Tvøroyrar kommuna, at har hevði verið eitt samskifti millum kommunurnar? Hvat var endamálið við samskiftinum, sum gjørdi, at Tvøroyrar kommuna helt, tað var best at halda samskiftið loyniligt?

Við skrivi, dagfest 2. apríl 2013, sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> ”…
> Kommunan hevur 3 mál í sambandi við umbøn um innlit viðvíkjandi byggimáli á Tvøroyri. Tey eru:
>
> **Okkara j.nr. 2012-1200**
> Tórshavnar kommuna biður um innlit frá Tvøroyra kommunu.
> Umsókn frá Tórshavnar kommunu (2012-1200/1).
> Tórshavnar kommuna tekur umbønina aftur (2012-1200/2).
> Eftirfylgjandi fær borgarstjórin handað avrit av 2 skjølum (2012-1200/4).

Orsøkin til, at biðið varð um innlit, var, at Tórshavnar kommuna hevði eitt mál í Kollafirði, har J skuldi byggja eina frystigoymslu afturat verandi bygningi á kajøkinum í Kollafírði. Fyri at stytta um málviðgerðartíðina ynskti byggideildin hjá Tórshavnar kommunu at fáa innlit í líknandi byggimálsviðgerð á Tvøroyri v.v. nýggja uppsjóvarvirkinum, sum C lat byggja har.

Orsøkin til, at Tórshavnar kommuna tók innlitsumbønina aftur, var, at kommunan ístaðin valdi at brúka mannagongdina sambært § 30 í fyrisitingarlógini og biðja Tvøroyrar kommunu um tilfarið sum lið í málsviðgerð í Tórshavnar kommunu.

Tilfarið varð borið borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu av tekniska leiðaranum í Tvøroyra kommunu.

**Okkara j.nr. 2012-1468**
H biður um innlit í tilfarið, sum Tórshavnar kommuna hevur fingið frá Tvøroyrar kommunu.
Umbøn frá H (2012-1468/1)
H fær avrit av teimum skjølum, sum borgarstjórin fekk handað (sí 2012-1200/4) og váttan um innlit (2011-0164/4).

H kom á býráðsskrivstovuna eftir tilfarinum, hann fekk høvi at gjøgnumganga tað á staðnum at tryggja sær, at hann fekk tað, hann bað um. Hann fekk síðani avrit av tilfarinum við sær.

**Okkara j.nr. 2012-1263**
A biður um innlit í samskifti millum Tórshavnar kommunu og Tvøroyra kommunu um virkið á Tvøroyri.
Umbøn frá A (2012-1263/1).
A fær avrit av skjølunum og váttan um innlit (2012-1263/3).

A kom á Snarskivuna eftir tilfarinum.
og
A setir kommunustjóranum spurningar um innlitsumbønina hjá H (pkt 2 omanfyri). Hann vil vita, um H hevur fingið umbidnu upplýsingarnar. Eisini vil hann vita, hvørt H hevur fingið svar uppá fyrispurning, hann hevur sett borgarstjóranum í telduposti frá 14. juni.

A fínst at, at kommunustjórin ikki svarar beinanvegin og vísir til, at 11 dagar eru síðani H hevur sent borgarstjóranum fyrispurningar sínar. Hann upplýsir ikki í skrivinum, hvørt hann spyr sum journalistur á KVF ella sum umboð fyri H, og hetta er eisini ógreitt eftir innihaldinum at døma. Kommunustjórin velur tó at viðgera skrivið sum eina innlitsumbøn og svarar settu spurningunum dagin eftir, at teir eru settir.

Teldubrævasamskifti millum A, journalist og D, kommunustjóra (2012-1263/5-9)

A fekk svar uppá spurningarnar, hann setti umvegis teldupost.

Klagarin hevur fingið avrit av øllum skjølum, ið kommunan hevur havt um málið, tá kommunan hevur fíngið umbøn um innlit. Klagarin hevur somuleiðis eftir bestu sannføring fingið svarað øllum spurningum, ið klagarin hevur sett kommununi í hesum máli.

Við skrivi, dagfest 2. apríl 2013, sendi Tvøroyrar kommuna umboðsmanninum soljóðandi svar:

"… Hin 25.05.2012 fekk Av, Kvf soljóðandi svar í telduposti frá Tvøroyrar kommunu:

*"Góðan dagin.*

Skjølini liggja klár til tín at hyggja at í móttøkuni á býráðsskrivstovuni, ið er opin mánadag til tórsdag kl. 09.00-16.00 og fríggjadag kl. 09.00-15.00.

> Um tú ynskir avrit av skjølunum, fært tú hetta móti gjaldi áljóðandi kr. 20,- smb. kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um innlit í fyrisitingina. Ynskir tú hetta, kann peningurin flytast á konto hjá Tvøroyrar kommunu nr. 6460-220.113.7 ella gjaldast kann við avheintan. Gjørt verður vart við, at gjaldast kann ikki við gjaldskorti. Um peningurin verður fluttur á konto hjá kommununi, verður tú vinarliga biðin um at hava kvittan við á býráðsskrivstovuna."
>
> Avrit av skjalinum varð sama dag lagt í móttøkuna til hansara at hyggja at ella taka við sær móti gjaldi."

Umboðsmaðurin helt síðani áfram við viðgerðini av málinum.

**Niðurstøða**

Sum nevnt viðgeri eg bert tann partin av klaguni, sum snýr seg um handfaringina hjá ávikavist Tórshavnar kommunu og Tvøroyrar kommunu av áheitanunum hjá klagaranum um innlit í samskiftið millum kommunurnar um uppisjóvarvirkið á Tvøroyri.

*Rættarvirknaðurin av, at Tórshavnar kommuna tók innlitsáheitanina aftur*

Báðar kommunurnar hava ført fram tað sjónarmið, at einki mál var at fáa innlit í, eftir at Tórshavnar kommuna tók innlitsáheitanina til Tvøroyrar kommunu aftur. Víst verður m.a. á, at ein umsókn (sum ein innlitsáheitan er) kann kallast aftur við tí rættarvirknaði, at hendan ikki er fevnd av rættinum til innlit. Eg meti hetta sjónarmið byggja á eina skeiva fatan av rættarstøðuni. Spurningurin um rættarvirknaðin av at kalla aftur eina umsókn í mun til reglurnar um innlit er viðgjørdur í viðmerkingunum til danska lógaruppskotið, sum er fyrimyndin fyri okkara innlitslóg (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001), og har stendur soleiðis í Folketingstidende 1985/86, tillæg A, spalte 213:

> "Tilbagekalder en privatperson *(mín undirstriking)* f.eks. en ansøgning og anmoder om, at ansøgningen og eventuelt medsendte bilag returneres, må dette normalt kunne imødekommes, medmindre sagens karakter eller indholdet af dokumenterne gør, at myndigheden har behov for at være i besiddelse af de pågældende oplysninger."

Ein *privatpersónur* kann sostatt vanliga kalla aftur eina umsókn, sum er send einum myndugleika, uttan so at myndugleikin av serligum orsøkum noyðist at fasthalda henni. Sendir ella móttekur hinvegin ein *myndugleiki* t.d. eina innlitsáheitan, verður eitt fyrisitingarligt mál stovnað, og hóast áheitanin seinni verður tikin aftur, kann myndugleikin ikki angra áheitanina við at beina fyri henni ella nokta at geva innlit í hana. Rættarvirknaðurin av, at Tórshavnar kommuna tók innlitsáheitanina aftur, var, at Tvøroyrar kommuna skuldi ikki viðgera hana, men innlitsáheitanin er og verður fevnd av rættinum til innlit, jbr. § 5, stk. 1, nr. 1 í innlitslógini, og hetta sama er galdandi fyri afturkallanina.

*Skjøl móttikin sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð*

Rætturin til innlit fevnir um skjøl, sum ein myndugleiki hevur móttikið ella gjørt *sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð*, jbr. § 4 í innlitslógini, og rætturin fevnir um *øll skjøl*, ið viðvíkja málinum, jbr. § 5, stk. 1, nr. 1

Tórshavnar kommuna sigur í frágreiðing til umboðsmannin, at kommunan metir tað vera ivasamt, um skjølini frá Tvøroyrar kommunu vóru móttikin sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð og harvið fevnd av rættinum til innlit. Kommunan sigur, at skjølini vóru ikki neyðug fyri nakra málsviðgerð og heldur, at tey kunnu samanberast við bókmentir og annað kunnandi tilfar, sum ikki er fevnt av skjalahugtakinum í innlitslógini.

Í fyrstu atløgu skal eg viðmerkja, at sjónarmiðið samsvarar illa við, at Tórshavnar kommuna hevur greitt frá, at hon tók tók innlitsáheitanina aftur við tí fyri eyga at biðja um skjølini "sum lið í málsviðgerð" sambært § 30 í fyrisitingarlógini, sum snýr seg um latan av upplýsingum, sum hava *týdning fyri virksemið hjá einum myndugleika ella fyri eina avgerð, sum myndugleikin skal taka*.

Í aðru atløgu eri eg ikki samd við kommununi í, at avgerðirnar hjá Tvøroyrar kommuna ikki eru móttiknar sum liður í fyrisitingarligari málsviðgerð. Tórshavnar kommuna hevur í sambandi við frammanfyri standandi viðgerð av eini umsókn um at byggja eina frystigoymslu í Kollafirði biðið um og fingið upplýsingar um málsviðgerðina í Tvøroyrar kommunu í samsvarandi máli við tí fyri eyga at kunna seg um, hvørji krøv vóru sett í sambandi við brunateknisku viðgerðina. Tað kann tí ikki vera nakar ivi um, at tær tvær avgerðirnar hjá Tvøroyrar kommunu eru móttiknar sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð hjá Tórshavnar kommunu og eru fevndar av rættinum til innlit sambært § 5, stk. 1, nr. 1 í ínnlitslógini.

*Skráseting av skjølum*
Sambært Tórshavnar kommunu vóru skjølini frá Tvøroyrar kommunu borin borgarstjóranum í Tórshavnar kommunu stutt eftir, at biðið varð um tey, t.v.s. um miðjan mai, men tey vórðu ikki skrásett sum móttikin fyrr enn tann 15. juni 2012. Hetta hevði við sær, at klagarin ikki fekk innlit í hesi skjølini frá Tórshavnar kommunu, tá hann fekk innlit í málið seinast í mai.

Skráseting av skjølum er, umframt at vera ein fortreyt fyri at málsviðgerðin kann eftirkannast, eisini ein fortreyt fyri, at reglurnar um innlit virka til fulnar sambært endamálinum, og sambært góðum fyrisitingarsiði áliggur tað einum myndugleika at skráseta inn- og útgangandi skriv skjótast gjørligt. Tað er tískil als ikki nøktandi, at Tórshavnar kommuna ikki skrásetti skjølini fyrr enn knappan mánað eftir, at tey vóru móttikin.

Tað framgongur av klaguni og frágreiðingini hjá Tórshavnar kommunu, at klagarin á annan hátt hevur fingið avrit av skjølunum, og eg geri tískil ikki meira við hendan spurningin.

*10 daga freistin*
Av tí at tað oftast er týdningarmikið fyri bæði borgarar og serliga fjølmiðlar at fáa skjalainnlit í eitt mál so skjótt sum gjørligt, er tað í § 16, stk. 1 í innlitslógini ásett, at ein myndugleiki *sum skjótast* skal gera av, um og á hvønn hátt ein umbøn um innlit kann verða gingin á møti. Myndugleikarnir hava sostatt eina serliga lógarásetta skyldu at svara innlitsumbønum skjótast gjørligt.

Í § 16, stk. 2 er ásett, at um støða ikki er tikin til innlitsumbønina innan 10 dagar, frá tí at hendan var móttikin, skal myndugleikin boða umsøkjaranum frá orsøkini til hetta, og nær ein avgerð væntandi verður til skjals. Endamálið við ásetingunum í § 16 er, at innlitsumbønir eiga at verða viðgjørdar við einum serligum skjótleika, og ikki uttan serliga orsøk taka longri tíð enn neyðugt er.

Tveir dagar eftir at hava sent Tórshavnar kommunu innlitsáheitanina, spurdi klagarin, um kommunan ikki skjótast gjørligt kundi leggja skjølini í Snarskivuna. Kommunan svaraði klagaranum, at hann fór at fáa svar innan 10 dagar. Svarið sýnist at byggja á ta fatan, at ein innlitsáheitan skal avgreiðast innan 10 dagar, og at kommunan kann bíða við at avgreiða hana til tá. Henda fatan er ikki í tráð við lógina. 10 daga frestin er ikki ein freist fyri, nær málsviðgerðin skal vera liðug, men ein fráboðanarfreist, sum í sjálvum sær er ætlað at viðvirka til, at málsviðgerðin ikki uttan orsøk dregur út. At ein innlitsáheitan skal viðgerast *sum skjótast* skal

skiljast bókstaviliga, og grundað á umstøðurnar og vavið á skjølunum í hesum málinum átti avgreiðslan í ítøkiliga førinum eftir mínari meting ikki at tikið meira enn ein dag ella tveir.

Eftir at klagarin spurdi, um kommunan beinanvegin kundi upplýsa, nær innlitsáheitanin hjá kommununi ávikavist var send og afturkallað, fekk hann at vita, at hann kundi hyggja skjølini ígjøgnum 4 dagar seinni. Havandi í huga, at klagarin í hesum føri samskifti við sama embætismann hjá kommununi, sum hevði sent og afturkallað innlitsáheitanina til Tvøroyrar kommunu, haldi eg tað vera átaluvert, at avgreiðslan av einum so einfaldum spurningi verður drigin út frá hósdegi til mánadag við teirri grundgeving, at journaldeildin skuldi leita málini fram. Og tá saman um kom var talan um eitt mál, sum innihelt nøkur fá skjøl.

*Hvør tekur avgerðina*
Tá biðið verður um innlit í eitt avgerðarmál, er tað sambært § 15, stk. 1 í innlitslógini tann myndugleikin, sum skal taka avgerð í málinum, sum skal taka støðu til innlitsspurningin. Er talan um mál, har eingin avgerð skal takast, er tað tann myndugleikin, sum hevur skjalið um hendi. Tað var tískil eisini ein feilur, tá Tvøroyrar kommuna bað klagaran venda sær til Tórshavnar kommunu fyri at fáa innlit, umframt at hetta var við til at draga viðgerðina av innlitumbøn klagarans til Tvøroyrar kommunu út við meira enn einari viku.

*Á hvønn hátt verður innlit latið*
Sambært § 16, stk. 1 í innlitslógini ger viðkomandi myndugleiki sum skjótast av, um tann, sum er komin við áheitan um innlit, skal verða gjørdur kunnugur við skjølini á staðnum, ella um avrit í staðin skulu latast viðkomandi. Tað er sostatt viðkomandi myndugleiki, sum í hvørjum einstøkum føri ger av, á hvønn hátt innlit verður givið.

Lógin sigur ikki beinleiðis, at ein umsøkjari hevur rætt til at fáa avrit av skjølum, sum eru fevnd av rættinum til innlit. Hinvegin gevur § 16, stk. 3, í lógini landsstýrinum heimild til at áseta gjøld fyri avrit og makaskjøl, og má hetta takast sum úttrykk fyri, at ein umsøkjari kann fáa avrit og makaskjøl. § 16, stk. 3 í føroysku lógini, er ein beinleiðis avskrift av samsvarandi regluni í donsku lógini, soleiðis sum hon var orðað, tá føroyska lógin varð samtykt. Í viðmerkingunum til donsku lógina stendur viðvíkjandi § 16 í Folketingstidende 1985/86 A, sp. 233 m.a.:

> „Det forudsættes således, at begæringer om at få afskrift eller fotokopi kun afslås, når der er særlig begrundelse herfor, f.eks. dokumenternes karakter, antallet af dokumenter, eller deres form”.

Út frá hesum ikki bert kann ein umsøkjari fáa avrit ella makaskjal, men eigur at fáa tað, uttan so at hetta gevur serligar trupulleikar, soleiðis sum nevnt í viðmerkingunum til donsku lógina.

*Um gjald fyri avrit frammanundan*
Í fráboðan síni til klagaran skrivaði Tvøroyrar kommuna, at skjølini lógu klár at hyggja at í móttøkuni á býráðsskrivstovuni, og um hann ynskti avrit, kundi hann fáa hetta móti gjaldi. Um hetta skal skiljast soleiðis, at tann, sum biður um innlit, altíð skal møta upp á staðnum, so haldi eg ikki, at ein slík støða er í tráð við lógina. Kommunan eigur at taka støðu í hvørjum einstøkum føri. Er talan t.d. um fá skjøl, kann tað vera lættast fyri báðar partar, at lata viðkomandi fáa avrit av skjølunum. Í frágreiðing til mín tann 2. apríl 2013 skrivar kommunan, at: “skjalið varð lagt í móttøkuna sama dag”. Eg gangi tískil út frá, at talan var um eitt einstakt skjal. Eg síggi onga orsøk til, um hetta er ein føst mannagongd, at tann, sum biður um innlit, altíð skal koma á staðið og gera seg kunnugan við skjølini.

Rætturin hjá myndugleikum at krevja gjald fyri innlit er ásettur í kunngerð nr. 198 frá 15. desember 1993 um gjald fyri avrit og fotoavrit eftir lógini um innlit í fyrisitingina. Í kunngerðini stendur einki um, nær gjaldið skal gjaldast, og myndugleikin kann vanliga ikki seta sum treyt, at gjaldið sambært

kunngerðini verður goldið, áðrenn avrit av skjølunum verða útflýggjað, soleiðis sum Tvøroyrar kommuna fráboðaði klagaranum. Tvøroyrar kommuna hevur ikki greitt frá grundgevingini fyri, at kommunan krevur gjaldið goldið frammanundan, men eg síggi onga rímiliga grund til at kommunan í hesum føri skal kunna draga avgreiðsluna av innlitsumbønini út við at krevja gjaldið goldið frammanundan. Vísandi til omanfyri standandi viðmerkingar mínar um, á hvønn hátt skjalainnlit verður latið og um gjald fyri innlit, fari eg at mæla Tvøroyrar kommunu til at broyta mannagongdirnar samsvarandi.

*Samanumtikið*
Samanumtikið er tað mín fatan, at fleiri lið í handfaringini av innlitsáheitanum klagarans virka sum forðingar fyri rætti klagarans at fáa innlit í umbidnu upplýsingarnar. Her skal serliga verða víst á, at Tvøroyrar kommuna í fyrstu atløgu noktaði fyri yvirhøvur at hava nøkur skjøl at geva innlit í, og at kommunan, tá hon loksins váttaði at hava skjølini, bað klagaran um at venda sær til Tórshavnar kommunu um at fáa innlit, hóast kommunan hevði skyldu til at viðgera áheitanina. Í handfaringini hjá Tórshavnar kommunu skal serliga verða víst á, at vantandi skráseting av skjølunum frá Tvøroyrar kommunu hevði við sær, at klagarin ongantíð fekk innlit í hesi frá kommununi, umframt at kommunan eftir mínum tykki kundi avgreitt áheitanina skjótari.

Burtursæð frá omanfyri standandi átalu og viðmerkingum geri eg ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu<br>umboðsmaður